# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 21.11.2022 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg
Gunnhild Mortensen
Thorstein Thomsen
Martin í Nesi
Poul Laust Christiansen (fyri Ronni Hammer)

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat – játtað og kemur á skrá sum mál nr. 7.

Poul Laust Christiansen luttók ikki í viðgerðini av máli nr. 1 og 2.

1. **102-83-2022: Umsókn um fíggjarligan stuðul 2023 frá bóltfelagnum ROYN.**
   Søkt verður um stuðul fyri 2023.
   **Fíggjarnevndin 21.11.2022:**
   Einmælt samtykt at mæla til at stuðla bóltfelagnum ROYN við kr. 100.000,00 komandi ár og at roknskapurin fyri 2022 verður latin kommununi, so skjótt sum hesin er tøkur.
   **Avgerð**:
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

2. **102-108-2022: Val av umboði til arbeiðsbólk – innkomið skriv frá bóltfelagnum ROYN.**
   Skriv frá ROYN í sambandi við nýggjan graslíkisvøll, har spurt verður, um kommunan hevur valt umboð til samstarv um hetta mál.
   **Trivnaðarnevndin 17.11.2022:**
   Nevndin mælir til, at hetta verður avgjørt á bygdarráðsfundinum tann 21.11.2022.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt, eftir uppskoti frá Janus Thomsen, at velja Ronni Hammer sum umboð og Martin í Nesi sum varaumboð at umboða kommununa í arbeiðsbólkinum.

3. **102-107-2022: Umbøn um játtan til keyp/viðlíkahald av ljóðførum til Suð. Musikkskúla.**
   Søkt verður um kr. 100.000 í ár til keyp og viðlíkahald av ljóðførum, har hvør kommuna í samstarvinum rindar sambært býtislyklinum eftir fólkatali.

**Trivnaðarnevndin 17.11.2022:**
Nevndin mælir til at játta umbønini sambært býtislyklinum, sum nevndur er í skrivinum.
**Fíggjarnevndin 21.11.2022:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at játta hesum, treytað av, at allar kommunurnar í samstarvinum eru við í hesum.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

4. **102-109-2022: Innkomin tilboð uppá vindeygu + hurð til Hvalbiar skúla.**
Innkomnu tilboðini eru frá Snikkaravirkinum D.P.R. – mahogni, Verk v/Eilif Dimon – mahogni og Grant – límtræ.
**Trivnaðarnevndin 17.11.2022:**
Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Verk v/Eilif Dimon.
**Fíggjarnevndin 21.11.2022:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum frá Verk v/Eilif Dimon.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

5. **102-105-2022: Fíggjarætlan 2023 – 2. viðgerð.**
Rakstrarútreiðslurnar eru mettar til kr. 33.583.000,00, íroknað útreiðslur til eldrasamstarvið BHS kr. 9.295.000,00 og afturgjald av skuld kr. 3.450.000,00. Løguútreiðslurnar eru kr. 1.500.000,00. Inntøkurnar eru mettar til kr. 33.395.000,00, harav inntøkan frá eftirlønargjøldum, DIS og FAS er kr. 9.295.000,00 sambært meting frá FMR.
Skattaprosentið verður 20,6% og barnafrádrátturin óbroyttur kr. 6.500,00.
**Fíggjarnevndin 21.11.2022:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at góðkenna fíggjarætlanina fyri 2023.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

6. **102-110-2022: Eykajáttan 2022 – 1. viðgerð.**
Umsóknin um eykajáttan er kr. 5.195.000,00.
**Fíggjarnevndin 21.11.2022:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka undir við umsóknini um eykajáttan 2022.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

7. **<u>102-26-2022: Byggisamtyktin</u>.**

Uppskot til kunngerð um broyting av byggisamtykt – dagføring kort.

1. Húsvegur á Hamranesi verður broyttur til at steðga við byrjan av matr. nr. 390a øki D: havnarøki.
2. Smiðjan á matr. nr. 200a, Hvalba verður broytt frá øki B:sethúsaøki til øki E:almennar tænastur.
3. Umleið 200 m2 av matr. nr. 523 á Hólum verður broytt til B:sethúsaøki.
4. Bátahylur á Hamranesi.
5. Matr. nr. 3a, 390f, 218a og 128a á Hamranesi, verða broytt frá øki J:landbúnaður til øki C:vinnuøki.
6. Matr. nr. 525b á Heyggi verður broytt frá øki J:landbúnaður til øki C:vinnuøki.
7. Umleið 224 m2 av matr. nr. 434g við kirkjuna í Sandvík verður lagt út til øki P:bilstøðlar.
8. Matr. nr. 462a og 513 í Sandvík verða broytt frá øki J:landbúnaður til øki D:havnarøki.
9. 338 m2 av matr. nr. 456b í Sandvík verður broytt frá øki G:frílendi til øki B:sethúsaøki.
10. Miðstaðaøki – broytast til miðstaða(r)øki.
11. 50 m2 av matr. nr. 178a, Hvalba verður broytt frá øki J:landbúnaður til øki B:sethúsaøki.
12. Matr. nr. 131d, við Krógv, Hvalba – 6.152 m2 verður broytt frá øki J:landbúnaður til øki B:sethúsaøki.

**<u>Avgerð</u>:**

Einmælt samtykt at taka undir við kunngerð um broyting av byggisamtyktini.

8. **<u>Ikki almenn mál</u>.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.30

Janus Thomsen Niels Olaf Eyvindsson Eir J. Norðberg Martin í Nesi

Gunnhild Mortensen Thorstein Thomsen Poul Laust Christiansen